TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ **23. juni 2011**	Blað nr.: **9146**
	Formansins merki:

GERÐABÓK

Dato: **23. juni 2011** **kl. 10.00**
Stað: **Fundarhølið í Ráðhúsinum**
Málsnr:143/11-150/11

FUNDARLEIÐARI:
Heðin Mortensen

VIÐ LUTTØKU AV:
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Fr□dal
Jógvan Arge
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein
Inga Dahl
Levi Mørk
Sjúrður Olsen

LUTTÓKU IKKI:
Jan Christiansen, ið hevði forfall
Maria H. Olsen, ið er burturstødd
Vagnur Johannesen, sum hevur farloyvi

LUTTÓKU EISINI:
Bjørgfríð Ludvig
Jóan Petur Hentze

SKRIVARI:
Ingibjørg Berg

PROTOKOLLFØRARI:
Magnus Dam

MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 09.45

144/11 **2010-2007**

Dagstovnurin í Hoyvik

Fyri eini tíð síðani varð staðfest, at Dagstovnurin í Hoyvik er fongdu av blámusoppi. Royndir vóru tiknar til tess at staðfesta vavið av blámusoppafongdu økjunum. Og út frá hesum varð gjørt útbjóðingartilfar til timburarbeiðið. Arbeiðið verður gjørt í stigum soleiðis, at ein lon verður gjørd í senn.

Samlaða kostnaðarmetingin ljóðaði tá uppá 6,4 mió. u. mvg, sum Húsaumsitingin eftir ætlan skuldi rinda av síni viðlíkahaldsjáttan fyri 2011 og 2010.

Nú veggir, gólv o.a. er niðurtikið kann staðfestast, at vavið av soppafongdu økjunum er munandi størri enn upprunaliga kanningarnar góvu ábending um. Tað er stórt sæð øll lonin, sum er soppafongd. Harumframt kann staðfestast, at fukt treingir upp gjøgnum gólvið. Helst hevur hetta verið so líka síðani bygningurin varð bygdur. Og nógvu lekarnir og soppavøksturin hava eisini viðført, at partar av berandi takkonstruktiónini er rotin og má skiftast út.

Vavið av umvælingararbeiðinum er tí vaksið munandi. Sambært eini dagførdari kostnaðarmeting grundað á vavið av skaddu økjunum, sum staðfest eru í fyrstu lonini, væntast umvælingarkostnaðurin nú at liggja upp ímóti 12 mió. kr. u. mvg.

Tá er framvegis ikki heilt greitt, um tað harumframt verður neyðugt at leggja n□tt takpapp á allan bygningin, og somuleiðis eru trupulleikar við lekum kring yvirljósini, sum ikki eru loystir enn. Hesi ting eru ikki við í kostnaðarmetingini.

Húsaumsitingin hevur ikki fíggjarligar umstøður til at bera ein enn størri part enn tær kr. 6 mió, sum upprunaliga ætlað. Ein loysn er, at írestandi peningurin verður funnin við umraðfestingum á íløguætlanini.

Skal arbeiðið halda fram, er neyðugt at játta meirfígging skjótast.

Fíggjarnevndin 14. apríl 2011: Kunnað varð um málið.

Býráðið fyri læsum hurðum 14. apríl 2011: Tikið av skrá.

Fíggjarnevndin 4. mai 2011: Umrøtt.

Ískoyti:

Niðanfyri er yvirlit yvir íløgujáttanir, sum mett verður kunnu vera vit til at fíggja meirkostnaðin av umvælingararbeiðinum.

Dagstovnur í Hoyvík - meirfíggingartørvur uml. 6 mió kr.

	Projektnr.	Upphædd
§ 3 Børn og ung		
Løgukarmur (frítíðarskúli)	-	1.000.000
FTS í Gula skúla	L31002	242.000
§ 5 Mentan og frítíð		
Musikkskúlin	L51002	3.800.000
Spælipláss í Grasagarði	L53001	150.000
Íløgukarmur (badmintonhøllin)	-	240.000
Tórsvøllur	L57008	4.538.000
Ítróttahøllin í Kollafirði	L57011	1.500.000
§ 6 Teknisk mál		
Íløgukarmur (fríðkan)	-	331.000
Kongabrúgvin	L62012	996.000
Vaglið	L62014	997.000
Frílendi til borgaran	L62015	217.000
Løgukarmur (kirkjugarðar)	-	1.000.000
Løgukarmur	-	396.000
Keyp og søla	-	1.500.000
§ 7 Kommunal virkir		
Útbúnaður á bátaøkinum	L74002	5.848.000
Í alt		**22.755.000**

Mentamálanevndin 18. mai 2011: Nevndin samtykti at biðja um gjølla frágreiðing um, hvussu tað ber til, at skaðin á húsið er so nógv kostnaðarmeiri enn mett varð í fyrstani.

Nevndin samtykti at mæla b□ráðnum um fíggjarnevndina til at játtaðar verða umleið 6 mió krónur aftrat til umvælingina av Dagstovninum í Hoyvík soleiðis:

Løgukarmur (frítíðarskúli)	1.000.000
FTS í Gula skúla	242.000
Badmintonhøllin	240.000
Keyp og søla	1.500.000
Húsaumvæling	2.500.000
B&U økt virks (rakstur)	500.000

Fíggjarnevndin 24. mai 2011: Deildarleiðarin í Húsaumsitingini greiddi frá málinum. Samtykt at mæla b□ráðnum til við eykajáttan at játta tkr. 12.000 av íløgum á konto 3175, barnaansing íløgur.

Íløgan verður fíggjað við niðanfyri standandi flytingum:

tkr.

3175	FTS, Løgukarmur	Lækking	-1.000
3175	FTS, Guli skúli	Lækking	-242
5775	Ítróttaranlegg løgukarmur	Lækking	-240
6175	Keyp og søla av fastari ogn	Lækking	-1.500
6110	Røkt av bygningum	Lækking	-8.518
3214	Børn og ung, Umvælingar o.a.	Lækking	-500
3175	Dagstovnurin í Hoyvík	Hækking	12.000

Býráðið 26. mai 2011: Tikið av skrá.

Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011: Nevndin samtykti at útseta málið til komandi fund.

Fìggjarnevndin 15. juni 2011: Tikið av skrá.

Býráðið 16. juni 2011: Tikið av skrá.

Ískoyti:
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini hava við útgangsstøði í fíggjarstøðuni hjá Húsaumsitingini, mett um hvussu Húsaumsitingin kann luttaka í kostnaðinum fyri heildarumvælingina av dagstovninum í Hoyvík.

Í mun til samlaða metta kostnaðin á kr. 12 mió., metir húsaumsitingin seg kunna átaka sær knappliga 60%, svarandi til 7,0 mió. kr.

Henda upphædd verður fíggjað soleiðis:

Av framfluttum avlopi frá 2010: kr. 4.500.000,-
Flyting av avlopi frá 2010, ætla til Müllers Pakkhús: kr. 300.000,-
Avsett á fíggjarætlan til røkt av bygninginum í 2011: kr. 800.000,-
Flutt frá røkt av Kommunuskúlanum
á fíggjarætlan 2011: kr. 500.000,-
Flutt frá røkt av Hoyvíkar skúla á fíggjarætlan
fyri 2011: kr. 500.000,-
Innanh□sis umraðfesting fyri røkt av dagstovnum kr. 250.000,-
Innanh□sis umraðfesting av røkt av mentunar-
bygningum á fíggjarætlan fyri 2011 (Móttøku-
húsinum og Müllers Pakkhús): kr. 150.000,-
Tilsamans kr. 7.000.000,-

Samlaða fíggingin sum umsitingin sostatt kann vísa á, og írestandi fíggingin er sostatt henda:

Uppskot frá trivnaðarumsitingini, teknisku umsiting og miðfyrisitingini:			
3175	FTS, Løgukarmur	Lækking	-1.000
3175	FTS, Guli skúli	Lækking	-242
5775	Ítróttaranlegg løgukarmur	Lækking	-240
6175	Keyp og søla av fastari ogn	Lækking	-1.300
6110	Avsett á fíggjarætlan til røkt av bygninginum í 2011	Lækking	-800
6110	Røkt av bygningum	Lækking	-4.500
6110	Røkt av bygningum	Lækking	-300
6110	Flutt frá røkt av Kommunuskúlanum á fíggjarætlan 2011	Lækking	-500
6110	Flutt frá røkt av Hoyvíkar skúla á fíggjarætlan 2011	Lækking	-500
6110	Innanhýsis umraðfesting fyri røkt av dagstovnum	Lækking	-250
6110	(Móttøkuhúsið 50 tús og Mullers Pakkhús 100 tús)	Lækking	-150
3214	Børn og ung, Umvælingar o.a.	Lækking	-500
	Tilsamans		**-10.282**
3175	**Dagstovnurin í Hoyvík**	**Hækking**	**10.282**

Býtið millum økir/nevndir	
Mentamálanevndin	-1.982
Byggi- og býarskipanarnevndin	-7.000
Fíggjarnevndin	-1.300
	-10.282

Írestandi fígging			
	Kostnaðarmeting		-12.000
	Umraðfestingar		10.282
	Írestandi fígging at finna innan umraðfestingar av íløgum		**-1.718**

Tilmæli:
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til fígging av kr. 10.282.000 sambært omanfyristandandi ískoyti, og at írestandi fíggingin á kr. 1.718.000 verður funnin innan umraðfestingar av íløgum.

Somuleiðis verður mælt til, at eitt møguligt avlop í mun til kostnaðarmetingina á 12 mió, fellur aftur til tær konti sum verða lækkaðar, við tí b[illegible]tislutfalli tær luttakað í samlaða kostnaðinum.

Mentamálanevndin 21. juni 2011: Samtykt at mæla til at játta kr. 10.282.000 sambært omanfyristandandi yvirliti og at málið um møguliga restfígging verður tikið upp aftur tá annar partur av umvælingini er liðugur.

Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2011: Nevndin samtykti at taka undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 23. juni 2011: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

Býráðið 23. juni 2011: Einmælt samtykt.

145/11 **<u>2009-3106</u>**

<u>Tórshavnar Musikkskúli – útvegan av hølum</u>

Lýsing av málinum – samandráttur:
Tórshavnar Musikkskúla tørvar betri hølisumstøður. Nevndin fyri Musikkskúlan hevur áhaldandi gjørt vart við hendan spurningin, og býráðið hevur javnan havt málið til umrøðu.

Nú er ætlanin at taka málið uppaftur. Í hesum umfarinum verður miðað eftir at fyrireika ætlanir at útvega Musikkskúlanum hølir, sum eru ætlað til endamálið, og at gera av, hvar hesi hølir skula vera.

Áhugin fyri at fáa frálæru í Musikkskúlanum er ovurstórur, og ikki er gjørligt at ganga øllum umsóknum á møti. Hetta er m.a. ein spurningur um, hvørja rakstrarjáttan skúlin hevur. Sum er rinda Mentamálaráðið og kommunan raksturin.

Musikkskúlin húsast í dag í mongum ymsum hølum kring um í býnum. Miðstøðin á Frúutrøð er ein gamal barnaskúli, sum hjálpt er uppá, men sum ikki gevur nøktandi umstøður.

Til tess at fáa gongd á fyrireikingar til at útvega Tórshavnar Musikkskúla tíðarhóskandi karmar verður mælt til at játta pening at fara undir neyðugt fyrireikingararbeiði.

Tilmæli:
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 1041-90-41002, Læknamiðstøð í Hoyvík, til staðseting/fyrireiking av musikkskúla, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Mentamálanevndin 2. desember 2009: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 9. desember 2009: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

Býráðið 17. desember 2009: Einmælt samtykt.

Ískoyti:
Fyrireikingararbeiðið higartil hevur fevnt um møguliga staðseting av nýggjum Musikkskúla og lýsing av hølistørvi.

Samskiftið hevur verið við Norðurlandahúsið um staðseting á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Norðurlandahúsið tekur væl undir við hesi staðseting, sum tó ikki skal ganga Norðurlandahúsinum ov nær.

Samskiftið hevur eisini verið við Musikkskúlan – bæði leiðara, umboð fyri lærarar og umboð fyri musikkskúlanevndina – um hølistørvin eins og um krøv til slíkan nýbygning sum heild. Skúlin hevur sent umsitingini meting um dagførdan hølistørv.

Til tess at koma meira ítøkiliga víðari skal avtala gerast við ráðgeva um at fáa gjørt dagførda byggiskrá og skitsuuppskot, sum lýsir ymsar loysnir bæði viðvíkjandi staðseting, skapi og byggilistarligum hugskoti. Fyrireikingararbeiðið er grundarlag fyri viðgerð og avgerð um endalig staðseting og víðari tilgongd. Játtan er til endamálið. Setast skal eisini ein bygginevnd.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at sett verður bygginevnd fyri nýggjum Musikkskúla, og at gjørd verður ráðgevaraavtala um byggiskrá, skitsuuppskot v.m.

Mentamálanevndin 2. juni 2010: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Býráðið 24. juni 2010: Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Gunnar Mohr

Í bygginevndina vórðu valdir Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein.

Ískoyti:

Fyrireikingararbeiðið er nú komið so mikið áleiðis, at byggiskrá skal gerast. Byggiskráin skal lýsa byggiætlanina, herundir rúmskrá, fermetrar og ymisk funktiónskrøv. Sambært politisk-fyrisitingarligu mannagongdini fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal faknevndin biðja um byggiskrá, sum bygginevndin síðani útvegar.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at biðja bygginevndina útvega byggiskrá, og at tað í hesum sambandi verður játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukontu 5175.

Mentamálanevndin 9. februar 2011: Mayfinn Norðoy, arkitektur, greiddi frá projektinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukonto 5175.

Býráðið 24. februar 2011: Einmælt samtykt.

Ískoyti:
Á fundi 1. juni 2011 samtykti bygginevndin formliga at senda byggi- og býarskipanarnevndini um mentamálanevndina umbøn um at viðgera og góðkenna staðseting av nýggjum Musikkskúla á matrikklarnar 1453a, 1410d (lutur I) og 1409 (lutur I), eigari Tórshavnar kommuna, samsvarandi skitsuuppskoti.

Umbønin hjá bygginevndini skal síggjast í ljósinum av, at arbeiðið við skitsuuppskoti og byggiskrá er um at verða liðugt. Bygginevndin hevur alla tíðina arbeitt við staðseting eystanfyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Bygginevndin hevur mett at henda staðseting er væl egnað til Musikkskúla, tí hetta liggur væl fyri í mun til stóru ferðsluæðrirnar, og at Musikkskúlin og Norðurlandahúsið sum nærmastu grannar fara at fáa gagn av hvørjum øðrum serliga í mun til konsertvirksemi og høli.

Sambært galdandi mannagongd fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal byggi- og býarskipanarnevndin góðkenna staðseting, eftir at avvarðandi faknevnd hevur góðkent byggiskránna.

Staðsetingin og byggiskráin eru ikki viðgjørd av umsitingini á Byggi- og býarskipanardeildini undan hesum fundinum.

Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011: Málið varð útsett.

Mentamálanevndin 15. juni 2011: Samtykt at taka undir við bygginevndini og beina málið víðari í byggi- og býarskipanarnevndina.

Fìggjarnevndin 15. juni 2011: Tikið av skrá.

Býráðið 16. juni 2011: Tikið av skrá.

Ískoyti:
Bygginevndin hevur fingið byggiskránna og mælir til at góðkenna hana við fyrivarni fyri, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingini áðrenn útbjóðing.

Bygginevndin mælir somuleiðis til at taka upp samráðingar um høvuðsráðgeva og um prosjektering, at undirráðgevingin verður boðin út, og at játtaðar verða kr. 3.800.000 av íløgujáttanini fyri 2011 á kontu 5175 til prosjektering.

Sambært galdandi mannagongd fyri íløguverkætlanir skal tekniska nevnd viðgera og góðkenna tekniska partin. Mentamálanevndin hevur 15. juni 2011 sambært somu mannagongd beint málið um at góðkenna staðseting til byggi- og b□arskipanarnevndina. Sambært kommunust□risskipani § 11, 2. petti skal tilmæli um íløgur til b□ráðið ganga um byggi- og b□arskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

Í hesum sambandi er at viðmerkja, at samlaði byggikostnaðurin sambært byggiskránni er ikki játtaður og framgongur heldur ikki fult út í mun til langtíðaríløguætlanina árini 2011-2014, og at ikki kann farast undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við bygginevndini, og at taka upp samráðingar við Kontrast um høvuðsráðgeva og um prosjektering. Undirráðgevingin verður boðin út.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla harumframt til at beina tekniska partin fyri teknisku nevnd at viðgera og góðkenna, og at beina tilmælið um at játta kr. 3.800.000 til prosjektering av kontu 5175 í b□ráðið um byggi- og b□arskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

Mentamálanevndin 21. juni 2011: Nevndin: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen og Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, tó tekur Annfinn Brekkstein støðu til spurningin um samráðingar um høvuðsráðgeva á seinni fundi.

Ískoyti:
Staðsetingin av n□ggjum musikkskúla eystanfyri Norðurlandahúsið, er í byggiskránni grundgivin soleiðis:

"Staðsetingin er vald útfrá verandi funktiónum í økinum við Kringvarpið og Norðurlandahúsið. Eitt mentunarøki sum við einum musikkskúla afturat sær fer at skapa synergi og eitt spinn off sum verður føroyskum tónleiki at frama.

Hølisviðurskiftini í hesum trimum húsum koma at komplementera hvørt annað – bæði í sambandi við tónleikatiltøk og gerandisdag. Ùtvarpshúsið og Norðurlandahúsið hava eisini eina hitaskipan sum musikkskúlin ómakaleyst kann knýta seg uppí."

Grundøkið fevnir um 3 matriklar og er umleið 9499 m2 til støddar:

Matr. nr. 1453a,
Eigari er Tórshavnar Kommuna
Støddin er 7016 m2

Matr nr. 1410d (lutur 1)
Eigari er Tórshavnar kommuna
Støddin er 1726 m2

Matr nr. 1409 (Lutur 1)
Eigari er Tórshavnar kommuna
Støddin er 757 m2

Økið er í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu lagt út sum C2-øki, Opin miðstaðarbygging, við hesi áseting: *"Umráðisparturin er í síni heild lagdur til miðstaðarendamál, serstakliga ætlað stovnum, framsýningarhøllum, samkomuhúsum, tónleikahøllum og øðrum mentunarligum stovnum og tílíkum og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi, skrivstovur, matstovur o.t."*

Byggistigið má ikki fara upp um 0,25 og nettonýtslustigið ikki upp um 0,3.

Býarskipanarumsitingin hevur ikki havt staðsetingarspurningin til ummælis áðrenn byggiskráin er gjørd liðug. Býarskipanarumsitingin hevur ikki viðgjørt staðsetingina undan hesi nevndarviðgerð. Býarskipanarumsitingin ger tí vart við, at aðrar staðsetingar, har slíkt virksemi eisini kundi ligið væl saman við øðrum mentunarligum og/ella undirvísingarvirksemi, sosum Marknagil, Skálatrøð, Vestara Bryggja v.fl. ikki hava verið viðgjørdar av umsitingini. Uttan hesa viðgerð, kann býarskipanarumsitingin sostatt bert vísa til undanfarna álit um staðseting av musikkskúla, sum býráðið áður hevur viðgjørt.

Viðv. tekniska partinum er sambært byggiskránni upplýst fylgjandi:

"Parkering og atkoma
Vísandi til gjøgnumstreymnin av fólki til og frá skúlanum er umráðandi, at aktoman, av- og áseting og parkeringsviðurskiftini eru nøktandi. Nýggju atkomu og parkeringsviðurskiftini verða soleiðis skipað, at hetta verður lagt yvirav innkoyring til Inn, Tórsbreyt og Kurlu. Pláss verður til uml. 40-50 bilastøðlar. Eisini er møguleiki fyri at gera parkeringshús við "grønum plássi" omaná staðsett upp ímóti ringvegnum. Gøta sambindur ferðslu hjá gangandi millum Sundsvegin og Ringvegin. Mentunarligt rekrativt øki verður skipað, hylur við tilknýti til verandi á- Hugsað er um møguleika fyri t.d. uttandura tónleikatiltøkum.

Nógv av- og áseting er knýtt at bygninginum, umframt at nógv trýst er í økinum frammanundan- við ferðslu til m.a. Norðurlandahúsið, Inn, Yndi, Kurlu og Tórsbreyt. Hetta skal havast í huga tá atkomuviðuskiftini vera loyst."

Tekniskar veitingar
Bindast skal í verandi kommunalar vatn- og kloakkskipanir. Kloakk og aðrar leiðingar í jørð verður partur av skipanaruppskotinum"

Plan- og rakstrardeildin hevur ikki havt tekniska partin til ummælis áðrenn byggiskráin er gjørd liðug. Plan- og rakstrardeildin ger tí vart við, at ætlaninar sambært byggiskránni viðv. ferðsluloysnum, parkeringstørvi, tekniskum veitingum v.m. ikki eru umrøddar við deildina frammanundan. Vísandi til nógva framførsluvirksemi, sum ætlanin er at hava í bygninginum sambært byggiskránni, og nógva framførsluvirksemi í økinum annars (Norðurlandahúsið og Kringvarpið), tekur plan- og rakstrardeildin fyrivarni fyri, at treytir verða settar í samband við byggimálsviðgerð, um fullfíggjaða ferðsluloysn og nøktandi tal av parkeringsplássum í mun til ætlaða virksemi.

Sambært kommunust□risskipani § 11, 2. petti skal tilmæli um íløgur til b□ráðið ganga um byggi- og b□arskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

Í hesum sambandi er at viðmerkja, at samlaði byggikostnaðurin sambært byggiskránni er ikki játtaður og framgongur heldur ikki fult út í mun til langtíðaríløguætlanina árini 2011-2014, og at ikki kann farast undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2011: Nevndin samtykti at góðkenna uppskotið til staðseting sambært byggiskránni, og at viðmæla at játta kr. 3.800.000 til projektering av kontu 5175, og at beina málið í b□ráðið um fíggjarnevndina.

Tekniska nevnd 21. juni 2011: Nevndin samtykti at arbeitt verður víðari við fyriliggjandi uppskoti og vísir á fyrivarni fyri, at treytir verða settar í sambandi við byggimálsviðgerð um fullfíggjaða ferðsluloysn og nøktandi tal av parkeringsplássum í mun til ætlaða virksemið. Samtykt at beina málið í b□ráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 23. juni 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 3.800.000 til projektering av konto 5175.

Býráðið 23. juni 2011: Einmælt samtykt.

146/11 **<u>2011-0977 (sí eisini j. nr. 2010-2637)</u>**

<u>Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1227a og 1228a við Oyggjarvegin.</u>

Lýsing av málinum - samandráttur:
Verkfrøðingastovan søkir um loyvi at útstykkja grannaognirnar, matr. nr. 1227a og 1228a, sum liggja millum Marknagilsvegin og Oyggjarvegin. Kommunan hevur í samráð við umsøkjaran gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið.

Lógir, ásetingar o.a.:
Økið liggur í umráðisparti A 1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Upplýsingar frá umsitingini:
Matr. nr. 1227a er 6.341 m² til víddar, og matr. nr. 1228a er 9.055 m² til víddar, tilsamans 15.396 m². Fríøkið verður 1.070 m² til víddar, felags p-pláss verða 12 stk. og talið av grundstykkjum verða 22 stk. Grundstykkini verða millum 402 m² og 611m²
Vegatkoma verður frá Hjaltarók, og hædd er tikin fyri at samanbinda útstykkingarvegin við Tummasargøtu. Ein ál á 8 m verður avsett til vegatkomu til grannatrøðna, matr. nr. 1226a.

Frávik:
Útstykkingin umfatar eitt øki, sum í núverandi byggisamtykt liggur í 4. grundumráði. Kommunan hevur samtykt at broyta byggisamtyktina, soleiðis at økið kemur at liggja í umráðisparti A1 í 3. grundumráði.

Umhvørvisárin:
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

Fíggjarligt:
Ongar fyri TK

Viðmerkingar frá øðrum deildum:
Tekniska deild

Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:

Skjøl:
Umsókn og tekningar, j.nr 2011-0997/1

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□ararkitekturin og b□arverkfrøðingurin mæla til at góðkenna uppskotið við viðmerkingum til serstaka byggisamtykt.

Tekniska nevnd 28. apríl 2011: Ein meiriluti, Marin Katrina Fr□dal, Halla Samuelsen, Levi Mørk og Sjúrður Olsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Símun Simonsen, tekur støðu á seinni fundi.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□ararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt, treytað av at byggisamtyktin verður broytt soleiðis at økið sum í dag liggur í 4. grundumráði kemur at liggja í umráðisparti A1 í 3. grundumráði.

Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Býráðið 26. mai 2011: Einmælt samtykt at beina málið í byggi- og b□arskipanarnevndina og teknisku nevnd.

Ískoyti:
Hin 27. jan. 2011 samtykti b□ráðið í mál nr. 2010-2637, at broyta byggisamtyktina fyri økið soleiðis, at markið millum A1-økið og 4. grundumráði fylgir matrikulmarkinum sambært kortskjali 03.01.11, j. nr. 2010-2637/2. Mál nr. 2010-2637 er ein broyting av almennu byggisamtyktini fyri eina røð av ognum fram við Marknagilsvegnum.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b□arakitekturin mæla til at halda fast við samtyktina hjá byggi- og b□arskipanarnevndini 2. mai 2011.

Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í b□ráðið.

Tekniska nevnd 21. juni 2011: Nevndin vísir til samtyktina hjá teknisku nevnd 28. apríl 2011 og beinir málið í b□ráðið.

Býráðið 23. juni 2011: Einmælt samtykt.

147/11 **<u>2011-1380</u>**

Samstarv við Esbjerg kommunu

Lýsing av málinum – samandráttur:
Undir vitjan hjá borgarstjóranum í Esbjerg í Tórshavn 24. – 27. mai 2011 undirskrivaðu borgarstjórin í Tórshavn og borgarstjórin í Esbjerg eina ætlanarkunngerð (hensigtserklæring) um, at b□ráðini bæði í næstum skulu fara at viðgera eitt útkast til samstarvssáttmála millum Tórshavn og Esbjerg, ið kommunurnar hava gjørt í felag. Málið er at undirskriva sjálvan sáttmálan í heyst.

Lagt verður upp til, at samstarvsavtalan skal verða við til at fremja búskaparvøkstur, fólkavøkstur, vinnumenning og mentanarsamstarv í b□unum báðum. Dentur kann leggjast á ávís nærri tilskilað samstarvsøki.

Útkastið til samstarvssáttmála nevnir, at setast skal ein samstarvsnevnd við borgarstjórunum, b□ráðslimum og embætisfólki, ið skal hittast til fundar í minsta lagi annað hvørt ár.

Fíggjarnevndin 8. juni 2011: Framlagt.

Býráðið 23. juni 2011: Einmælt samtykt.

148/11 **<u>2010-2767</u>**

<u>Val av býráðslimum til stýrisbólk til umskriving av heildarætlan til kommunuplanin sambært § 36 í kommunustýrislógini</u>

Lýsing av málinum - samandráttur:
Býráðið 27. januar 2011: Vald vóru Elin Lindenskov, Marin Katrina Fr□dal, Bogi Andreasen, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Ískoyti:
Niðursetti st□risbólkurin fyri arbeiðinum, hevur arbeitt fram uppskot til "planstrategi" ið er fyrsta stigið av arbeiðinum. Teksturin til hetta verður t□ddur til føroyskt, og tá er tað greitt at leggja fram alment til hoyringar aftaná b□ráðssamtyktina.

Tilmæli:
St□risbólkurin mælir byggi-& b□arskipanarnevndini til at taka undir við uppskotinum til planstrategi, og at beina málið í b□ráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mars 2011: Samtykt at taka málið av skrá og viðgera tað á einum serstøkum fundi.

Tekniska nevnd 5. apríl 2011: Samtykt at taka málið av skrá og viðgera tað á einum serstøkum fundi saman við byggi- og b□arskipanarnevndini.

Fíggjarnevndin 6. apríl 2011: Málið umrøtt. Stjórnin ger uppskot til skipan av arbeiðinum og nevndarsamansetingini, ið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

149/11 **<u>2011-1553</u>**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ 23. juni 2011	Blað nr.: **9160** Formansins merki:

<u>Kommunuætlan samb. § 36 í kommunystýrisskipan.</u>

Lýsing av málinum – samandráttur:
Vísandi til samtyktina í fíggjarnevndini 6. apríl 2011, hevur umsitingin gjørt n□tt uppskot til arbeiðsleist fyri hetta arbeiðið. Arbeiðið er í hesum uppskotinum, í størri mun, skipað soleiðis, at politisku umboðini, hava ein aktivari leiklut, soleiðis at skilja, at hvør faknevnd hjá b□ráðnum luttekur í, og góðkennur arbeiðið fyri teirra málsøki. Víðari góðkennur b□ráðið stigvíst samlaða kommunuplanin í tveimum umførum, fyri endaliga at góðkenna ein samlaðan kommunuplan.

N□ggi leisturin leggur sostatt somuleiðis upp til, at ein samlað umsitingarlig stjórn er umboðað í tí st□risbólki, sum skal bera fram arbeiðið til nevndirnar at luttaka í og góðkenna. Hetta vil tryggja, at umsitingarligi parturin eisini er umboðaður við sínari leiðslu á einum neyðugum støði.

Uppskotið til víðari leist fyri arbeiðið við kommunuplaninum, sær sostatt soleiðis út:

Kommunuplan
Uppskot til n□ggjan leist fyri arbeiðinum við kommunuplan fyri Tórshavnar kommunu.

Skotið verður upp, at umskipa arbeiðið á tann hátt, at:

- **Býararkitekturin:** hevur ábyrgd av at savna og arbeiðir fram tilfar, sum verður umrøtt og góðtikið av st□risbólkinum.

- **Stýrisbólkurin** leggur tilfarið fyri avvarðandi faknevndir fyri hvørt málsøki, sum er til viðgerð, á *1. verkstovu.*

- **Borgarstjórin** fyriskipar formansumfør við allar nevndarformenninar at umrøða framlagda tilfarið. Her samskipar politiski parturin ynskir, mál og mið fyri hvørja faknevnd.

- **Stýrisbólkurin** fær eina góðkenning av framlagda fyri faknevnd av tilfarinum á *2. verkstovu.*

  Hetta fyri at tryggja, at politiska skjalið, er í samsvari við málsøkisætlan hjá hvørjari faknevnd.

- Tá allar faknevndir hava latið góðkenning av framarbeidda tilfar, tekur st□risbólkurin stig til at leggja arbeiðið fyri fíggjarnevnd og b□ráð.

- **Býráðið** avgreiðir. Samtykkir ella leggur til almenna hoyringsumfar.

Stýrisbólkur verður :
Heðin Mortensen, borgarstjóri

Ingibjørg Berg, kommunustjóri
Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri
Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri
Bjørgfríð Ludvík, miðfyrisitingarstjóri

Samskipari, ábyrgdari:
Mikael Viderø, býararkitektur

Tilmæli:
Vísandi til týdningin av, at allar politiskar nevndir og umsitingarligar deildir fáa ávirkan á og ognarskap í kommunuplaninum, og at framtíðar ynski og tørvur á øllum viðkomandi økjum verður samskipaður í kommunuplaninum, mælir stjórnin til at taka undir við uppskotinum til broyttan arbeiðsleist, sambært omanfyristandandi ískoyti, og at beina málið í býráðið, at broyta samtyktina frá 27. jan. 2011 um samanseting av stýrisbólkinum, samsvarandi broytta arbeiðsleistinum.

Fíggjarnevndin 23. juni 2011: Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge og Elin Lindenskov mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

Býráðið 23. juni 2011: Atkvøtt varð um tilmælið hjá fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk, Jákup Símun Simonsen, Bogi Andreasen og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Inga Dahl.

150/11 **<u>2010-2280</u>**

<u>Søla av matr. nr. 1315a, Tórshavn.</u>

Lýsing av málinum – samandráttur:
P/F Poul Michelsen, søkir um at keypa matr. nr. 1315a, Tórshavn frá Tórshavnar kommunu.

Ætlanin er at leggja ognina saman við matr. nr. 1315c, (Gummibátatænastan), sum felagið eigur. Soleiðis at uttanum økið verður størri kring bygningin.

Felagið eigur frammanundan ognirnar matr. nr. 1316b, (heilsølan)matr. nr. 1315c, (Gummibátatænastan) matr. nr. 1316e, (sethús) og matr. nr. 1316a jJarðarstykkið)

Viðmerkjast skal at ætlanin hjá felagnum er at keypa vegin eisini.

Upplýsingar um ognina.
Talan er um eitt vinnugrundøki, sum er til støddar 2.471 m², herav er vegur 1.018 m².
Stykkið er ikki útgrivið ella planerað
Vegurin er umleið 107 metrar langur og um 9–10 metrar breiður.

Sjálvt grundøkið er 80 metrar langt, og um 9 metrar breitt í smalasta enda og um 30 metrar har tað er breiðast.

Vegurin gevur atgongd til matriklarnar 1315B, (Undirvísingar og Mentamálast□rið) og matr. nr. 1316e (sethús hjá P/F Poul Michelsen).

Matrikulin liggur eisini uppat matr. nr. 1302 (óbygd trøð, ogn hjá Harald Debes) og matr. nr. 1314 (óbygd trøð, ogn hjá Eyðbjørg Fossádal) og matr. nr. 1316a. (óbygt stykki, ogn hjá P/F Poul Michelsen).

Vinnustykkið liggur í einum D-øki.

Virðismeting av ognini.
Sp/f Protek hevur virðismett ognina. Niðurstøðan er, at økið er lítið í stødd til størri vinnuvirki. Stykkið hevur vega atgongd, og verður roknað sum byggibúgvið.

Sambært meting er fermeturprísurin fyri stykki kr. 600,00 (Tá er vegurin frámatrikuleraður). Stykkið verður hereftir stórt 1.453 m², og mett virði kr. 871.800,00

Sambært teknisku deild, er kostnaðurin av einum 10 metra breiðum vegi í dags prísum umleið kr. 15.000 meturin.

Vegurin er uml. 107 metrar til longdar. T.v.s. at byggikostnaður av einum tílíkum vegi í dag er mettur til umleið kr. 1.605.000,00. Samlaður mettur prísur íroknað vegin verður hereftir kr. 2.476.800,- (fermetur prísur 1.002,02)

Um kommunan velur at selja vinnugrundøkið og ikki vegin, má grundøkið gjalda sín lutfalsliga part fyri vegaatgongd.

Annað:
§ 44 í kommunust□rislógini ásetur : Føst ogn hjá kommununi má ikki seljast, uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment.

Hetta verður eisini staðsett í kunngerð nr. 122 frá 22. december 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

Sambært hesi kunngerð kunnu gerast nøkur undantøk frá almennum útboði, men er sølan av hesum matrikli ikki umfatað av hesum undantøkum

Ein møgulig søla av nevnda grundøki til P/F Poul Michelsen, skal tí góðkennast av Innlendismálarráðnum.

Tilmæli:
Leiðarin á løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at koyra málið í avarandi faknevndir.

Fíggjarnevndin 19. januar 2011: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og b□arskipanarnevndina og teknisku nevnd.

Ískoyti:
Víst verður til notat hjá umsitngini j. nr 2010-2280/8, har tað m.a verður víst á, at um Tórshavnar kommuna letur matr. nr. 1315a, Tórshavn frá sær, kann møguleikin hjá kommununi gleppa av hondum, at vísa atkomuna til stóru óbygdu trøðna matr. nr. 1302, Tórshavn, um ikki ásetingar um vegaatkomu ella tekniskar veitingar verða settar sum treytir, ið verða at l□sa sum servituttur á matrikulin. Hinvegin er einki til hindurs fyri at loyva sølu av parti av økinum, soleiðis at ovari partur av vegnum framhaldandi gerst kommunalur. Tó skal viðmerkjast, at kommunan sum meginreglu hevur ynski um at yvirtaka privatar vegir, heldur enn at selja vegir til privat.

Umsitingin greiðir annars frá fyrimunum og vansum við sølu av matr. nr 1315a, Tórshavn.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og leiðarin fyri plan- og rakstrardeildini mæla frá at selja matr. nr. 1315a, vísandi til, at kommunan sum meginregla ikki ynskir fleiri privatar vegir enn neyðugt, umframt at vegurin er atkoma til matr. nr. 1314 og aðrar matriklar.

Tekniska nevnd 10. mars 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 16. mars 2011: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

- Nevndin ynskir at viðgera málið.

Tekniska nevnd 7. juni 2011: Nevndin samtykti at viðmæla umsóknini at selja økið matr. nr. 1315a, treytað av at vegurin verður frámatrikuleraður av matr. nr. 1315a og at kommunan í sølutreytunum tryggjar sær møguleika at leggja tekniskar leiðingar gjøgnum økið og beinir málið í byggi- og b□arskipanarnevndina.

Ískoyti:
Viðmerkingar frá býarskipanardeildini

B￼arskipanardeildin hevur ikki nakrar viðmerkingar til samtyktina frá teknisku nevnd 7 juni 2011.

Atgongdin til matr. 1314 er avtalað við eigaran av Helga Fossadal sí skitsu j.nummar 2001-0997/22.

Atgongdin til matr. 1302, sum liggur út í móti Hoyvíksvegnum, verður frá Hoyvíksvegnum sambært teknisku deild tá málið verður aktuelt.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og b￼ararkitekturin taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd 7.juni 2011, at selja økið matr. nr. 1315a, treytað av at vegurin verður frámatrikuleraður av matr. nr. 1315a og at kommunan í sølutreytunum tryggjar sær møguleika at leggja tekniskar leiðingar gjøgnum økið og beinir málið í fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 23. juni 2011: Málið útsett.

Býráðið 23. juni 2011: Tikið av skrá.

151/11 **<u>2010-2930 (sí j.nr. 2011-1430 og 2010-1718) RFP</u>**

<u>Kloakk frá Frítíðarskúlanun og rossafjósunum í Havnadali</u>

Lýsing av málinum, samandráttur:
Sambært samtykt í fíggjarnevndini 9. september 2010, j.nr. 2010-1718, hevur umsitingin latið gera uppskot til heildarloysn fyri frárensl frá bygningum á økinum.

Víst verður til kunngerð nr. 90 frá 28 sept. 2007, kap. 7 § 19, ið ásetir at: „ ´Einki, ið kann dálka vatnið, má verða leitt í áir, løkir, vøtn, strond ella føroyskt sjóøki ella goymast so nær teimum, at vandi er fyri at tað kann skolast út í tey. “

Ì hesum sambandi hevur Umhvørvisstovan boðað frá, at í seinasta lagi 1. januar 2015 skulu allar kloakkskipanir hjá kommununum lúka hesar ásettu treytir.

Staðfest er, at økið í Havnadali ikki l￼kur hesar treytir. Har ein frítíðarskúli, hestafjós v.m. lata sínar kloakkir renna út í Tvørá. Hetta má fáast í rættlag og verður biðið um kr. 250.000 til uppmátingar og projektering av hesum arbeiði.

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin og leiðarin av plan- og rakstrardeildini mæla til at beina málið í mentamálanevndina til útvegan av fígging til projektering.

Tekniska nevnd 10. februar 2011: Nevndin samtykti at beina málið í fíggjarnevndina at útvega fígging.

Fíggjarnevndin 16. februar 2011: Samtykt at beina málið aftur í tekniska nevnd við atliti til at ávísa fígging til arbeiðið.

Ískoyti:
Tekniska umsitingin hevur ikki sett pening av til planlegging av projektering av kloakk arbeiðum innan játtaðum fíggjarkarmum. Sambært umhvørvisslógini er tað álagt kommununi at gera neyðug atlit fyri ikki at dálka umhvørvið.

Sambært uppriti frá løgdeildini um spurningin viðv. kloakering við atliti frá ólógligari bygging, verður m.a. vís á, at:

Endamálið við umhvørvislógini (og kunngerðunum, ið eru heimilaðar í umhvørvislógini) er at tryggja, at spillivatn verður burturleitt á ein skipaðan hátt og at fyribyrgja umhvørvisdálking og heilsuvanda. Eftir, at kommunan hevur gjørt eina heildarætlan, sum er góðkend av landsstýrismanninum, kann kommunan venda sær til ymisku húsaeigararnar og heita á tey, um at fylgja ásetingunum í kloakætlanini, við tilvísing til heimildina §§ 14 og 21. Stk. 2, í kunngerð um umhvørvisreglur, eru soljóðandi:
§ 21. *[2)] (Sett úr gildi).*
Stk. 2. Hevur bý- ella bygda(r)ráðið lagt ella fer tað at leggja spillvatnsleiðing, hava eigarar av lendi, sum liggur nærindis, fyri egna rokning skyldu til at leiða egið spillvatn til felags spillvatnsleiðingina, og kann bý- ella bygda(r)ráðið áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.
§ 14. Spillvatn. *Grundeigari hevur skyldu til at bera so í bandi, at spillvatn ikki setur inn á annan mans grund. Um so er, skal hann fyri egna rokning bøta um amparnar, og kann bý- ella bygda(r)ráðið áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi*
Sambært § 2, stk. 1 nr. 3 í kunngerð um spillivatn er spillivatn allýst sum : vatn, sum á einhvønn hátt er dálkað, og sum ikki kann roknast sum regnvatn.
Umhvørvislógin tekur ikki hædd fyri hvørja bygging talan er um – t.v.s. hvørt tað er lógligt ella ólóglig bygging. Útgangspunktið er, at har spillivant verður útleitt, skal tað leiðast burtur á skipaðan hátt.
Í mun til ásetingarnar í § 8 "Kunngerð nr. 111 frá 7. September 2009 um spillivatn", ið er soljóðandi:
§ 2 *Kunngerðin fevnir um kommnunalu ábyrgdina at burturleiða spillivatn frá húsarhaldum, virkjum, festum økjum o.ø. sambært góðkendari spillivatnsætlan" og § 18 " Løgtingslóg um umhvørvisvernd", ið er soljóðandi:*
§ 18. *Kommunan skal gera eina heildarætlan um, hvussu spillvatnið í kommununi skal fáast burtur.*
er greitt, at kommunan er myndugleikin, ið skal gera eina heildarætlan um, hvussu spillivatnið í kommununi skal fáast burtur.

Verður hugt nærri at tí virksemi, ið er úti á økinum kring fjósini í Havnardali, er talan um virksemi, sum ikki hevur verið viðgjørt í teknisku nevnd ella heilsu- og umhvørvisnevndini – við atliti til vegaatkomu og umhvørvið. Hetta virksemið er sett í verk, uttan tað á nøktandi hátt eru tikin neyðug atlit til tey teknisku og umhvørvisligu viðurskiftini. Her er tíverri ikki gjørdur nakar vegur við hartilhoyrandi veitingum sum vatn og ljós, og heldur ikki er nøkur skipað góðkend kloakkleiðing gjørd.

Skal tekniska nevndin hava ábyrgd av at fáa rættað upp á verkætlanir, ið eru settar í gongd av øðrum nevndum, má tekniska nevndin fáa tær neyðugu játtanir til júst hetta endamálið. Skal fígging hinvegin fáast til vega innan ásettu fíggjarkarmum hjá teknisku nevnd, eru útlit fyri at onnur arbeiði, ið nevdin umsitir, eftirfylgjandi mugu bíða ella útsetast.

Tilmæli:
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin ávísir fígging til projektering og kostnaðarmeting, upp til kr. 250.000, av íløgujáttanini til kloakkir í 2011, og at arbeiðið verður raðfest á íløguætlanini fyri 2011 og møgulig restfígging av íløguætlanini fyri 2012. Somuleiðis verður mælt til at boða eigarum og leigarum í økinum frá, at tey hava skyldu at halda krøvini sambært umhvørvislógini, og at binda í kloakkina tá hon er gjørd, og at rinda íbindingargjald í hesum sambandinum.

Tekniska nevnd 10. mars 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í b□ráðið um fíggjarnevndina. Málið verður beint í heilsu- og umhvørvisnevndina til kunningar.

Fíggjarnevndin 16. mars 2011: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og mæla b□ráðnum til at játta kr. 250.000 kr. av íløgujáttanini til kloakkir í 2011 til projektering og kostnaðarmeting.

Býráðið 24. mars 2011: Einmælt samtykt.

Ískoyti:
Endaligt projekt er gjørt av P/f Pb Consult og var boðið út í innbodnari lisitatión, sum var hildin á skrivstovuni hjá Pb Consult tann 3. juni, kl. 14.00.
Úrslitini vóru hesi, sí skjal nr. 2010-2930/11.

Tilboðini eru kannað og mælt verður til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá Maskingrevstur P/f v/Frank Hellisdal

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, alternativ II, áljóðandi kr. 706.930,- og í øðrum lagi alternativ I, álj. 1.100.680.- og beina málið um fíggjarnevndina í b□ráðið.

Tekniska nevnd 7. juni 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilboðnum frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, alternativ II, áljóðandi kr. 706.930,- og beinir málið í b□ráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 8. juni 2011: Útsett.

Fìggjarnevndin 15. juni 2011: Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd at ávísa restfígging.

Býráðið 16. juni 2011: Tikið av skrá.

Tilmæli:
Tekniski stjórin, b□arverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, alternativ II, áljóðandi kr. 706.930,- og beina málið um fíggjarnevndina í b□ráðið, og at verkætlanin verður fíggja sambært mál nr. 2011-1430.

Tekniska nevnd 21. juni 2011: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í b□ráðið, um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndn 23. juni 2011: Samtykt at mæla b□ráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og fíggja sambært mál 2011-1430.

Býráðið 23. juni 2011: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

FUNDUR LOKIN KL. 10.55

GERÐABÓKIN GÓÐKEND:

Jógvan Arge	Sjúrður Olsen	Bogi Andreasen
Marin Katrina Fr□dal	Halla Samuelsen	Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein	Inga Dahl	Levi Mørk
Maria H. Olsen	Jákup Símun Simonsen	Jan Christiansen
	Heðin Mortensen	